# REGLUGERÐ
## fyri bátahylin í Vestmanna.

**Grein 1.**

Bátahylurin í Vestmanna skal bert nýtast til smábátar í stødd upp til umleið seksæringar.
Bátarnir skulu vera heimahoyrandi í Vestmanna.

**Grein 2.**

Tá ynskt verður leguplass í bátahylinum, skal skrivlig umsókn sendast havnarskrivstovuni um hetta. Í umsókníni skal gjølla uppgevast bátastødd (longd og breidd) og harumframt møguligt navn og skrásetingarnummar.

**Grein 3.**

Tá umsóknin verður játtað, verður leigusáttmáli undirskrivaður, og tá fyrsta gjaldið verður goldið, fær leigarin eitt legunummar, sum er ogn hjá Vestmannahavnar Havn, og hetta skal vera fest á bátin á sjónskum stað.

**Grein 4.**

Tað er ikki loyvt leigara at framleiga ella lána plássið til annan.
Um ikki brúk er fyri plássinum eina tíð av árinum, skal Vestmannahavnar Havn hava boð um hetta, og Havnin skal tá kunna leiga plássið til annan í hesum tíðarskeiði. Gjaldið í slíkum førum verður mánaðargjald roknað út eftir takstunum í grein 5 og grein 14. Viðkomandi, sum hevur rættin til plássið, skal tó framvegis gjalda fult gjald.

**Grein 5.**

Tann til eina og hvørja tíð av Vestmanna Bygdarráð ásetta ársleiga skal verða goldin havnarskrivstovuni innan 1. januar - frammanundan fyri hvørt árið.
Tann árliga leigan er í løtuni:
1.000 kr árliga fyri bátapláss upp til 2,00 m breidd.
1.500 kr árliga fyri bátapláss upp til 2,50 m breidd.
2.000 kr árliga fyri bátapláss upp til 3,30 m breidd.
Fyri hvørjar 10 cm, breiddin er omanfyri 3,30 m, verða goldnar 100 kr.
Um leigan ikki verður goldin rættstundis, ella leigarin ikki heldur tær fyri bátahylin ásettu reglur, hevur Vestmannahavnar Havn rætt til at krevja leigumálið avtikið beinanvegin.
Tá bátur fær pláss í bátahylinum, skal gjaldast frá tí 1. í mánaðinum, plássið verður játtað.

**Grein 6.**

Bátar og aðrir tilhoyrandi ognarlutir hjá leigara, sum liggja í bátahylinum, eru fyri leigarans egnu ábyrgd.

**Grein 7.**

Ansast má væl eftir ikki at skaða brúgvar, bummar og aðra útgerð í bátahylinum. Møguligir skaðar, ið verða gjørdir, má viðkomandi sjálvur endurgjalda.

**Grein 8.**

Tað er ikki loyvt at hava amboð, fiskireiðskap, tilfar, útgerð og annað tílíkt liggjandi á flotbrúgvunum, men skal alt, har liggur, beinast burtur beinanvegin, annars verður tað beint burtur fyri eigarans rokning og ábyrgd.
Hvør leigari sær skal haldað økið á flotbrúnni innanfyri sítt bátapláss rudduligt og reint.

**Grein 9.**

Tað er strangliga bannað at koyra garnar, høvd o.t. á sjógv í bátahylinum. Somuleiðis er tað strangliga bannað at koyra olju, oljuúrdráttir og annað burturkast á sjógv.

**Grein 10.**

Báteigarar skulu síggja til at halda bátin lens, soleiðis at vandi ikki er fyri, at báturin fer undir bummarnar og kemur at gera skaða á aðrar bátar og ognir hjá Vestmannahavnar Havn.

**Grein 11.**

Bátar mugu ikki verða lagdir aðrastaðni í bátahylinum, enn í teir til endamálið gjørdu básarnar.

**Grein 12.**

Sigling í bátahylinum **skal** fara fram við størsta varsemi og altíð við **lítlari ferð**.

**Grein 13.**

Leigarin hevur annars skyldu til at fylgja øllum boðum frá havnar-myndugleikunum viðvíkjandi viðurskiftum í bátahylinum.

**Grein 14.**

Um pláss er í bátahylinum, kunnu avbygdabátar fáa bátapláss.
Serligur sáttmáli kann gerast við eigarar av avbygdabátum, sum tryggjar teimum pláss í 10 ár. Afturfyri gjalda teir 27.500,- kr í sáttmálagjaldi umframt leigugjald sambært grein 5.
Avbygdabátar, sum ikki ynskja pláss sambært serligum sáttmála, kunnu eisini fáa pláss.
Leigan fyri avbygdabátar, sum ikki ynskja pláss sambært serligum sáttmála, er 2.000,- kr um mánaðin. Hetta er eisini galdandi fyri avbygdabátar, sum fáa pláss sambært grein 4.
Uppsagnartíðin fyri vestmannabátar er 3 mánaðir og fyri avbygda-bátar 1 mánaður, og minsta gjald fyri avbygdabátar er fyri 3 mánaðir.

Vestmanna Bygdarráð, tann 17. januar 2006